# 800 fólk á móttøku í Vági

**Eini 800 fólk vóru á møttøku á 100 ára degnum hjá VB sunnudagin**

100 ÁRA FØÐINGARDAGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Sunnudagin fylti eitt av gomlu ítróttarfeløgunum í landinum,Vágs Bóltfelag, 100 ár. Í hesum sambandi var skrúðgongu seinnapartin í fagrasta veðri frá Gamla Skúla og vestur á Eiðið.

Aftaná hevði VB almenn móttøku í ítróttarhøllini og har vóru eini 800 fólk samankomin at heiðra felagnum í eini prýðiliga pyntaðari ítróttarhøll.

À móttøkuni fekk VB eisini fleiri gávur frá ymsum stuðlum.

Í sambandi við 100 ára dagin hava tey í VB gjørt eitt stórt arbeiði at savna saman myndir, sum hava við VB at gera og ein partur av hesum myndum, sum lýsa søguna hjá felagnum langt aftur í tíðina, hingu uppi í høllini.

Til føðingardagin hevur Vágs Bótlfelag eisini fingið vitjan úr Íslandi. Vágur og Sandgerði eru vinabýir og samstarvið og góða vinalagið ímillum VB og Reynir røkkur heilt aftur í fimtiárini og fyrr vitjaðu VB og bóltfelagið í Sandgerði, Reynir, javnan hvørt annað.

Seinastu árini hava vitjanirnar tó ikki verið so títtar sum fyrr, men hesa vikuni hava Reynir verið í Vági og vitja. Reynir spælir í triðbestu deildini í Íslandi og sunnudagin royndu teir seg ímóti VB. VB vann dystin 5-1

Sjálv 100 ára veitslan verður seinni í ár.



*Nógv fólk hevði leitað sær í ítróttarhøllin a í Vági sunnudagin at heiðra Vágs Bóltfelag á 100 ára degnum*

# Undangongufólk og trúgvar stuðlar heiðraðir

**Á stórfingnari móttøku í ítróttar høllini í Vág, nýtti Vágs Bóltfelag høvi til at heiðra tvær eldsálir**

HEIÐUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Eru tað tvey gomul hjørtu i Vági, sum banka hart og heitt fyri VB, eru tað hjørtuni á Petur Vilhelm og Onnu Petersen.

Petur Post og Anna hjá John, sum tey vanliga verða nevnd, hava verið av ídnastu VB- viðhaldsfólkum alt teirra lív.

Petur Vilhelm, sum fylti 85 herfyri, hevur verið undangongumaður í VB og eitt áramál var hann formaður.

Anna Petersen fylti 90 fyrr í ár, men tað hevur ikki lagt ein dempara á hugin og viljan at stuðla VB.

Bæði eru tey framvegis av ídnastu viðhaldsfólkum og stuðlar hjá VB.



*85 ára gamli Petur Post og 90 ára gamla Anna hjá John fingu gullnál frá VB á móttøkuni sunnudagin*

Anna er mangan enn og ferðast við liðnum, tá ið spennandi dystir eru. Soleiðis var hon við í Klaksvík herfyri, tá ið VB-kvinnurnar vunnu føroyameistaraheitið í hondbólti.

Tey, sum plaga at vera við landsliðnum í fótbólti munnu eisini kenna hana aftur, tí tá ið føroyingar spæla landsdyst, hevur Anna týðum talst ímillum áskoðararnar.

Á móttøkuni í Vági sunnudagin, nýtti formaðurin í VB, John Henrik Holm, høvi til at handa teimum báðum hvør sína 100 ára gullnál, sum einans er gjørd í heilt fáum eintøkum.

Petur Post er frammanundan einasti heiðurslimur í VB.

# Bjóða Suðuroy fram sum heilsuoyggj

**Suðuroyggin hevur allar fortreytir fyri at gera sær dælt av, at sunnur lívsstílur hevur so stóran týdning fyri fólk nú á døgum**

HEILSUOYGGJ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Suðuroyggin hevur allar møguleikar at gerast ein skeiðsmiðdepil fyri heilsu, lívsdygd og vælveru, segði Søren Lünell Bruhn, stjóri í Suðuroyar Sparikassa á evnisdegnum sum hann skipaði fyri saman við Føroya Tele*

Ein sunnur lívsstílur hevur ótrúliga stóran týdning fyri fólk nú á døgum. Samstundis leggja fólk størri dent á at forkela seg sjálvi og at føla seg væl.

Tað er eitt rák í samfelagnum, sum Søren Lünell Bruhn, stjóri í Suðuroyar Sparikassa, heldur, at Suðuroyggin eigur at gera sær dælt av.

Á evnisdegnum, sum Suðuroyar Sparikassi og Føroya Tele skipaðu fyri um menningarmøguleikar í Suðuroynni hósdagin, skeyt hann upp at gera Suðuroy til eina heilsuoyggj.

Hann vísti á, at í Suðuroy finnast øll fakfólk, sum eru ein fortreyt fyri at gera oynna til eina heilsuoyggj, heilt frá fótterapeutum til fysio- og ergoterapeutar og læknar.

Hann heldur tí, at Suðuroyggin er vælhóskandi at gera eitt skeiðsdepil í heilsu og vælveru.

– Tað kann verða ein skeiðsdepil, sum kann upplýsa skeiðsluttakararnar um sjúku, heilsu og vælferð. Men hetta skal eisini vera ein skeiðsdepil, sum skal selja upplivilisi.

Hann helt at møguleikarnir eru nógvir.

Og hann spurdi, hví føroyingar, sum viga ov nógv, skulu sendast til Danmarkar á klænkiskeið fyri einar 60-70.000 krónur.

Hví ikki senda teir til Suðuroyar á klænkiskeið ístaðin. Vit kunnu enntá fáa fólk uttaneftir til Suðuroyar á slík skeið.

Hann nevndi eisini skeið fyri eldri, sum ein góðan møguleika, har fólk kunnaði pensjónistar um. Hvat tað merkir at blíva eldri, hvat hendir í kroppinum.

Ein annar møguleiki er at hava skeið fyri kvinnur, sum eru við barn, tí hjá kvinnum við barn eru ótaldir spurningar um alt ímillum himmal og jørð, bæði viðvíkjandi sjálvum barnsburðinum, men eisini um lógir og reglar, um fíggjarligar spurningar.

– Møguleikarnir eru óavmarkaðir, helt hann.

### Byrja í heyst

À evnisdegnum kom vórðu eisini nakrar ítøkiligar ætlanir um slík skeið løgd fram.

Ein arbeiðsbólkur, sum varð settur á evnisdegnum, kom til tað úrslit at arbeiða víðari við fimm ymsum skeiðum í fyrstu atløgu.

Miðað verður ímóti at halda hesi skeið í heyst og fólk eru farin í holt at fyrireika tey.

Talan er um tvey skeið í reinføri, eitt skeið um reinføri í fiskivinnuni og eitt skeið um reinføri á barnagørðum og dagstovnum annars.

Somuleiðis verður arbeitt við einum skeiði í sansastimulering og einum skeiði fyri praktikkvegleiðarar.

Og at enda verður arbeitt fyri einum eldraskeiði.